DÁNJAL MAGNUSSEN
advokatur
TORMÓÐUR DJURHUUS
advokatur
JÓGVAN P. LASSEN
advokatur
PETUR EVEN DJURHUUS
advokatur
JÓGVAN E. ELLEFSEN
advokatur
ANNA DAM
advokatfulltrúi
INGI HØJGAARD
advokatfulltrúi

At henda fotomynd er sonn
20 FEB. 2006
K Balle
verður váttað
SKRÁSETING FØROYA

# S T O V N I N G A R S A M T Y K T

Undirritaðu

Mortan Johannesen, Torfinsgøta 44, 100 Tórshavn;
Hildigunn Johannesen, Torfinsgøta 44, 100 Tórshavn;
P/F Kongshavnar Útgerðarfelag, 625 Glyvrar;
P/F Føroya Bjór, 700 Klaksvík;
P/F J.F.K. Trol, 700 Klaksvík;
P/F Farodane, 100 Tórshavn;
P/F Svend Krosstein, 100 Tórshavn;
P/F Teymavirkið, 620 Runavík;
P/F SÚSI, 100 Tórshavn;
S/F Føroya Sjóvátrygging, 100 Tórshavn;
P/F Poul Hansen, 100 Tórshavn;
P/F Smyril Line, 100 Tórshavn;
P/F Havnar Timburhandil, 100 Tórshavn;
P/F Vestlax, 350 Vestmanna;
P/F Havsbrún, 530 Fuglafjørður;
P/F Hvilvtenni, 520 Leirvík;
Føroya Sparikassi, 100 Tórshavn;
P/F Tórshavnar Skipasmiðja, 100 Tórshavn;

hava í dag gjørt av at stovna eitt partafelag við støði í niðanfyri uppsetta uppskoti til viðtøkur:

MÓTTIKIÐ
19 FEB. 1998
SKRÁSETING FØROYA

- - - o - - -

19 FEB. 1998

VIÐTØKUR FYRI "P/f Atlantic Petroleum"

I. Navn, heimstaður og endamál

§ 1.

Navn felagsins er **"P/f Atlantic Petroleum"** við hjánavninum **"P/F Atlants Kolvetni (Atlantic Petroleum)"**.
Heimstaður felagsins er Tórshavnar kommuna.
Endamál felagsins er at reka vinnu innan kolvetnisútvinnan og annan handil og aðra vinnu í hesum sambandi.

**II. Partapeningurin**

§ 2.

**Stk. 1.**
Partapeningur felagsins er **kr. 25.500.000,00.**
Partarnir eru kr. 500,- til støddar og multipla av hesum.
Eingi partabrøv hava framíhjárættindi.
Partabrøvini skulu ljóða uppá navn, og eru ikki-negotiabul.
Partaeigararnir hava onga skyldu at lata partabrøv síni innloysa.

**Stk. 2.**
Eingin partaeigari kann eiga meiri enn 20 % av partapeninginum í felagnum og eingin kann greiða atkvøðu á aðalfundi í felagnum við meiri enn 20 % av atkvøðunum. Løgfrøðiligir persónar, ið innanhýsis eru so tætt knýttir hvør at øðrum, at annar hevur avgerðandi ávirkan á viðurskiftini hjá hinum, verða at meta sum ein í mun til hesa ognar- og atkvøðuavmarking, soleiðis at hesir løgfrøðiligu persónar tilsamans bert kunnu eiga og greiða atkvøðu fyri í mesta lagi 20 % í partapeningi.

Sum dømi um slíkt tætt tilknýti millum løgfrøðiligar persónar, ið fevnt er av hesi grein, kunnu nevnast:

- innanhýsis viðurskifti millum partafeløg, ið eftir ásetingunum í § 2 í partafelagslógini eru at meta sum koncernbundin;
- innanhýsis viðurskifti millum aðrar løgfrøðiligir persónar og partafeløg, har hesir aðrir løgfrøðiligu persónar eiga meiri enn ella hava rætt til at greiða atkvøðu fyri meiri enn 50 % av partapeninginum í partafelagnum;
- innanhýsis viðurskifti millum almennar stovnar.

**Stk. 3.**
Fyrstu 10 árini eftir at felagið er skrásett, kunnu bert fylgjandi persónar vera eigarar av partabrøvum í felagnum:

1. Einkultpersónar, ella einkultpersónar í felagsskapi, sum hava heimarætt í danska kongaríkinum, hava fastan bústað í Føroyum, hava verið skrásettir í føroyska fólkayvirlitinum seinastu tvey árini og eru fult skattskyldugir í Føroyum.
2. Føroya Landsstýri, almennir føroyskir stovnar, føroyskar kommunir, føroyskir kommunalir felagsskapir, grunnar fevndir av anordning nr. 247 frá 3. maj 1993 um lóg um vinnurekandi grunnar, har minst 50 % av grundkapitalinum er inngoldin av føroyskum donori, Føroyagrunnurin frá 1971, føroyskir sparikassar, føroysk sínamillum tryggingarfeløg;
3. Onnur feløg, sum lúka fylgjandi treytir:
   a) Felagið skal vera skrásett í Skráseting Føroya ella hjá Føroya Landfúta. Um felagið ikki er skrásetingarskyldugt, skal tað hava heimstað og høvuðsskrivstovu í Føroyum;
   b) Eigarar av meira enn 50 % av ognar-/luta-/partapeninginum, sum somuleiðis umboða meira enn 50 % av atkvøðu-/avgerðarrættinum í felagnum, skulu lúka tær undir pkt. 1 ella 2 nevndu treytir. Er eigarin eitt móðirfelag, so skal meira enn 50 % av ognar-/luta-/partapeninginum, sum somuleiðis umboðar meira enn 50 % av atkvøðu-/avgerðarrættinum í móðirfelagnum, tilhoyra persónum í lúka treytirnar í pkt. 1 ella 2.

Avhending av partabrøvum krevur samtykki frá nevnd felagsins og í hesum sambandi skal nevnd felagsins síggja til, at treytirnar í § 2 stk. 3. eru loknar, bæði í samband við góðkenning av uppruna-ligari tekning av partapeningi í felagnum og við møguligum handli av partabrøvum.

Um løgfrøðiligur persónur, frásæð einkultpersónum, ið eftir at verða vorðin partaeigari, eftirfylgjandi ikki uppfyllur treytirnar í pkt. 2 og/ella pkt. 3 í hesi grein, hevur hesin skyldu til alt fyri eitt at boða nevnd felagsins frá hesum við áheitan á nevndina um at lýsa partabrøvini til sølu alment í Føroyum fyri hægst bjóðandi, tó í minsta lagi fyri kurs, ið grannskoðari felagsins verður at áseta við støði í roknskapum felagsins, har hædd eisini verður at taka fyri good will og framtíðarútlitum felagsins annars. Fæst eingin keypari innan 6 vikur eftir at almenn lýsing er farin fram í minsta lagi trýggjar ferðir, kann partaeigarin varðveita ognarrætt sín til partabrøvini, hóast treytirnar í pkt. 2 og 3 ikki eru loknar.

10 ár eftir at felagið er skrásett, fellir § 2 stk. 3 í viðtøkum felagsins burtur uttan víðari.

**§ 3.**

Nevnd felagsins hevur heimild til at bjóða út til tekning í Føroyum partapening í felagnum til støddar í mesta lagi kr. 30.000.000,00 og stendur henda heimild við fram til tann 31. dec. ár 1999.

Fyri hesa nýtekning av partapeningi verða at galda hesar ásetingar:

1. Innbjóðing til at tekna partapening fer fram sum ein áheitan á áhugaði um at koma við tilboði um at vilja tekna partapening í felagnum.

2. Partapeningurin fær somu rættindi í felagnum sum verandi

partapeningur;

3. Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og eru ikki-negotiabul;

4. Partaeigararnir hava onga skyldu at lata partabrøv síni innloysa;

5. Verandi partaeigarar fráfalla framíhjárætt sín til tekning av hesum partapeningi;

6. Henda avmarking er galdandi fyri partabrøvini, og fyri avhanding av teimum:

Fyrstu 10 árini eftir at felagið er skrásett, kunnu bert fylgjandi persónar vera eigarar av partabrøvum í felagnum:

1. Einkultpersónar, ella einkultpersónar í felagsskapi, sum hava heimarætt í danska kongaríkinum, hava fastan bústað í Føroyum, hava verið skrásettir í føroyska fólkayvirlitinum seinastu tvey árini og eru fult skattskyldugir í Føroyum.

2. Føroya Landsstýri, almennir føroyskir stovnar, føroyskar kommunir, føroyskir kommunalir felagsskapir, grunnar fevndir av anordning nr. 247 frá 3. maj 1993 um lóg um vinnurekandi grunnar, har minst 50 % av grundkapitalinum er inngoldin av føroyskum donori Føroyagrunnurin frá 1971, føroyskir sparikassar, føroysk sínamillum tryggingarfeløg;

3. Onnur feløg, sum lúka fylgjandi treytir:

a) Felagið skal vera skrásett í Skráseting Føroya ella hjá Føroya Landfúta. Um felagið ikki er skráseting-arskyldugt, skal tað hava heimstað og høvuðsskrivstovu í Føroyum;

b) Eigarar av meira enn 50 % av ognar-/luta-/partapening-inum, sum somuleiðis umboða meira enn 50 % av atkvøðu-/avgerðarrættinum í felagnum, skulu lúka tær undir pkt. 1 ella 2 nevndu treytir. Er eigarin eitt móðirfelag, so skal meira enn 50 % av ognar-/luta-/partapeninginum, sum somuleiðis umboðar meira enn 50 % av atkvøðu-/avgerðarrættinum í móðirfelagnum, tilhoyra persónum í

lúka treytirnar í pkt. 1 ella 2.

Avhending av partabrøvum krevur samtykki frá nevnd felagsins og í hesum sambandi skal nevnd felagsins síggja til, at treytirnar í § 2 stk. 3. eru loknar, bæði í samband við góðkenning av upprunaligari tekning av partapeningi í felagnum og við møguligum handli av partabrøvum.

Um løgfrøðiligur persónur, frásæð einkultpersónum, ið eftir at verða vorðin partaeigari, eftirfylgjandi ikki uppfyllur treytirnar í pkt. 2 og/ella pkt. 3 í hesi grein, hevur hesin skyldu til alt fyri eitt at boða nevnd felagsins frá hesum við áheitan á nevndina um at lýsa partabrøvini til sølu alment í Føroyum fyri hægst bjóðandi, tó í minsta lagi fyri kurs, ið grannskoðari felagsins verður at áseta við støði í roknskapum felagsins, har hædd eisini verður at taka fyri good will og framtíðarútlitum felagsins annars. Fæst eingin keypari innan 6 vikur eftir at almenn lýsing er farin fram í minsta lagi trýggjar ferðir, kann partaeigarin varðveita ognarrætt sín til partabrøvini, hóast treytirnar í pkt. 2 og 3. ikki eru loknar.

10 ár eftir at felagið er skrásett, fellir § 2 stk. 3 í viðtøkum felagsins burtur uttan víðari.

7. Freistin fyri almenningin til at seta fram tilboð um at vilja tekna partapening, verður 4 vikur eftir at innboðið er alment til tekningar.

8. Nevnd felagsins skal góðkenna hvønn einstakan teknara av partapeningi í felagnum og stendur tað nevndini frítt fyri at avgerða, um hon vil góðkenna teknara ella ikki. Nevndini nýtist ikki grundgeving fyri at sýta tekning. Ynskir nevndin at sýta fyri tekning, skal viðkomandi hava fráboðan um hetta í innskrivaðum brævi sent honum í seinasta lagi 2 vikur eftir at tann í pkt. 7 nevnda tíðarfreist er runnin. Er tekning ikki sýtt innan nevndu 2 viku freist, verður tilboð um

tekning at meta sum góðkent.

9. Teknaður partapeningur er gjaldkomin vikudagin eftir, at tann í pkt. 8 nevnda tíðarfreist er runnin.

10. Partabrøvini eru til støddar kr. 500,00 og multipla av hesum.

11. Tekning fer fram til kurs pari.

12. Við yvirtekning, ger nevnd felagsins frítt av, hvussu tann til tekningar innboðna partapeningsupphædd skal býtast millum tey, ið boðið hava sær til at tekna.

§ 4.

Boð frá partafelagnum til partaeigararnar skulu sendast hvørjum einstakum skrivliga til tann bústað, ið seinast er skrivaður í partabrævabókina og við lýsing í almennum føroyskum lýsingarblað. Partabrøvini kunnu mortifiserast uttan dóm eftir teimum fyri partabrøv, sum eru ikki-negotiabul, til eina og hvørja tíð galdandi lógarreglur.

## III. Aðalfundurin

§ 5.

Aðalfundurin verður skipaður av partaeigarunum, ið hava eina atkvøðu fyri hvørjar kr. 500,- teir eiga í partapeningi.
Partarnir skulu vera innskrivaðir í partabrævabók felagsins, áðrenn aðalfundurin verður hildin, fyri at geva atkvøðurætt.

§ 6.

Nevndin boðar til aðalfundar á heimstaði felagsins við tilskilan av tíð, stað og dagsskrá í minsta lagi 14 og í mesta lagi 30 dagar frammanundan, hetta við skrivliga at venda sær til hvønn einstakan partaeigara á tí bústað, ið seinast er skrivaður í partabrævabókina, og við lýsing í almennum føroyskum lýsingarblað.

§ 7.

Vanligi aðalfundurin verður hildin á hvørjum ári, áðrenn apríl mánaður er úti, til viðgerðan av

1. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapin og ársfrágreiðing.
4. Val av nevnd.
5. Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.
6. Mál, ið nevndin ella partaeigararnir ynskja til viðgerðar.

§ 8.

Einum og hvørjum partaeigara er heimilað til skrivliga at bera fram uppskot til viðgerðar á aðalfundinum av einum ávísum evni, um so er, at hann setur fram krav um hetta til nevndina í so góðari tíð, at evnið kann verða tikið við á dagsskránni fyri aðalfundin.

§ 9.

Eykaaðalfundur verður at halda, tá ið nevndin ella grannskoðari ella ein aðalfundur ger av ella tá ið partaeigarar, ið tilsamans eiga 1/10 av partapeninginum, skrivliga krevja tað til viðgerðan av ávísum evni, ið samstundis verður tilskilað.

§ 10.

Í seinasta lagi 8 dagar frammanundan hvørjum aðalfundi verður at leggja fram á skrivstovu felagsins til eftirlit fyri partaeigararnar dagsskrá og fullfíggjað uppskot, ið verða at bera fram á aðalfundinum og til vanligan aðalfund eisini ársroknskapurin.

§ 11.

Atgongd til aðalfundin hava partaeigarar, ið eftir partabrævabókini við partabrævi, ið er innskrivað í bókina, kunnu prógva, at teir eru partaeigarar. Partaeigari kann skrivliga geva øðrum persóni fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.

§ 12.

Aðalfundurin velur eftir uppskoti frá nevndini ein fundarstjóra.

§ 13.

Á aðalfundinum verða øll mál at gera av við vanligum atkvøðumeiri-luta, uttan so at partafelagslógin fyriskrivar annað.

§ 14.

Tað, sum verður havt til umrøðu á aðalfundinum, verður ført í eina fundarbók, sum verður undirskrivað av fundarstjóranum.

§ 15.

Øll atkvøðugreiðsla fer fram skrivliga, uttan so at fundurin velur annan atkvøðugreiðsluhátt.

**IV. Nevndin**

§ 16.

Nevnd felagsins hevur 5 limir.

Vanligi aðalfundur felagsins velur nevndina og verða limirnir valdir fyri 2 ár í senn, 2 limir annað hvørt ár og 3 limir annað

hvørt ár. Fyrstkomandi vanliga aðalfundin eftir stovnan av felagnum, standa tveir limir fyri vali og verður við lutakasti millum nevndarlimirnar gjørt av hvørjir hesir eru. Afturval er loyvt.

Nevndin skipar seg sjálv og skal seta stjóra til at stjórna dagligu leiðsluna av felagnum.

§ 17.

Nevndin hevur fund, so ofta formaðurin metur tað neyðugt, ella um ein av hinum nevndarlimunum ella ein stjóri ynskir tað.

§ 18.

Eingin avgerð kann verða tikin á nevndarfundi, uttan so at 3 nevndarlimir eru á fundi. Allar avgerðir verða tiknar við vanligari fleirtalsavgerð. Standa atkvøðurnar á jøvnum, so ræður atkvøða formansins.

§ 19.

Felagið verður bundið við undirskrift av tveimum nevndarlimum saman ella av einum nevndarlimi saman við stjóranum ella av allari nevndini.
Fundarumrøður og viðtøkur verða skrivaðar í bók, sum verður undirskrivað av øllum á fundi.
Nevndin hevur heimild at geva fulltrúarumboð.

§ 20.

Á hvørjum vanligum aðalfundi verða valdir upp til tveir grannskoðarar til at kanna roknskapin og meta hann saman við bøkurnar. Grann-skoðararnir skulu verða løggildir.

§ 21.

Roknskaparár felagsins er almannakkaárið. Fyrsta roknskaparárið tó frá stovnanini til 31/12-1998.

§ 22.

Roknskapurin verður gjørdur í samsvar við góðan roknskaparsið og soleiðis at allar kravdar og neyðugar avskrivingar og burturleggingar verða gjørdar.

- - - o - - -

Stovnararnir tekna allan partapeningin.
Partapeningurin verður at tekna til kurs pari.
Tekning og inngjalding av partapeningi verður at fara fram seinast 14 dagar eftir at henda stovningarsamtykt er undirskrivað.
Partapeningurin verður at greiða kontant.
Vísandi til ásetingarnar í § 9 í partafelagslógini, verður stovnandi aðalfundur felagsins at fara fram beinanvegin stovningarsamtyktin er undirskrivað.
Felagið verður at bera kostnaðin í samband við stovnanina og fer hesin kostnaður ikki uppum kr. 200.000,00. Nevndi kostnaður fevnir um skrásetingargjald á 4 o/oo av skrásetta partapeninginum + 600 kr, lýsingarkostnaður á umleið kr. 1.000,00, at fáa til vega partabræva- og fundarbók fyri felagið, advokatkostnaður í samband við luttøku í kannan av grundalagi fyri virksemi felagsins og fyri stovnan av felagnum, herundir ferðakostnaður, ásettur til kr. 43.000,00, umframt MVG.

Tórshavn, tann 11. februar 1998

Mortan Johannesen

Hildigunn Johannesen

P/F Føroya Bjór

P/F J.F.K. Trol

P/F Farodane

P/F Svend Krosstein

P/F Teymavirkið

P/F SÚSI

S/F Føroya Sjóvátrygging

P/F Kongshavnar Útgerðarfelag

P/F Poul Hansen

P/F Smyril Line

P/F Havnar Timburhandil

P/F Vestlax

P/F Havsbrún

P/F Hvilvtenni

Føroya Sparikassi

P/F Tórshavnar Skipasmiðja